# Leder for filetav-delingen

Da vår nåværende avdelingsleder skal over i ny jobb i bedriften søker vi **leder for filetavdelingen.** Avdelingslederen har det daglige ansvar for produkt og produksjonsprosessen i avdelingen. Avdelingen har 90 ansatte og avdelingslederen har det daglige personalansvar. Evne og interesse for å lede og motivere vil derfor bli vektlagt Avdelingslederen inngår i bedriftens ledergruppe og rapporterer til produksjonsleder som har der overordna driftsansvar.

Vi søker først og fremst etter en person som har evne og kunnskap i forhold til å lede produksjon. Der er en fordel med kjennskap til fiskeindustri, men vi oppfordrer også personer som ikke har bakgrunn fra fiskerinæringen til å søke.

Lønn etter avtale. Vi er behjelpelige med å skaffe bolig. Bedriften har egen pensjonsforsikring.

Kontakt produksjonsleder Øyvind Bolle tlf. 78983431/ 97706861 for nærmere information.

Søknad med CV og attester sendes til Havprodukter AS, pb. B, 9990 BÅTSFJORD innen 11. februar.

**Havprodukter AS** er en del av konsernet Nordic Sea Holding AS. Havprodukter AS er lokaliseret til Båtsfjord i Finnmark, Norge og har 150 ansatte. Vi producerer konsumprodukter og videreforedlede produkter av hvitfisk for eksport. Bedriften er organiseret i 5 avdelinger, brygge, teknisk, filet, ferdigvare og administrasjon

**Kassamiðstøðin**
**FO-650 Toftir**
**Tlf. 449950 • Fax 449953**

# Hálvtíðar skrivstovustarv

Við hesum verður søkt eftir einum fólki til skrivstovu okkara á Toftum.

**Uppgávur:**
Arbeiði verður fjølbroytt, og kemur at fevna um kundarøkt, bókhald og annað skrivstovu-arbeiði.

**Førleikakrøv:**
Vit seta eingin ávís faklig førleikakrøv. Tó hava umsøkjarar við útbúgving innan handil, bókhald og/ella skrivstovu fyrimun. Eisini royndir við teldum, datagrunnum/bókhaldsskipanum og skrivstovuarbeiði geva fyrimun.

Álit, nærlagni, góð samstarvsevni og arbeiðsemi verður sett í hásæti.

**Løn- og setanartreytir:**
Arbeiði er ætlað sum hálvtíðarstarv. Løn, arbeiðstíðir og treytir verða sambært nærri avtalu.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kassamiðstøðina, og spyrja eftir Kára.

Umsóknir skulu vera Kassamiðstøðini í hendi innan mánaðarskiftið. Allar umsóknir vera viðgjørdar í trúnaði.

Kassamiðstøðin P/F er eitt 6 ára gamalt partafelag, ið veitir tænastur til fiskivinnuna. Vit hava í miðal 4 ársverk umframt undirveitarar.
Kassamiðstøðin hevur 5 goymslur runt landið, við høvuðsgoymslu og skrivstovu á Toftum.
Á skrivstovuni arbeiða vit við Navision Financial bókhaldsskipan, FB heimabanka og MB Office skrivstovuskipan.

# Lívfrøðingur til Føroya Náttúrugripasavn

Føroya Náttúrugripasavn er stovnur undir Undirvísingar- og mentamálastýrinum og fevnir um Plantusavnið og Djórasavnið.

Føroya Náttúrugripasavn hevur til endamáls at granska, savna, varðveita, handfara og framsýna landsins náttúrufrøðiligu virði. Herundir arbeiðir Djóradeildin eisini við havsúgdjórum, ið er málsøkið hjá Fiskimálastýrinum.

Við tí endamáli at menna granskingina av havsúgdjórum verður við hesum søkt eftir lívfrøðingi á Djóradeildina á Føroya Náttúrugripasavni.

**Starvið**
Høvuðsuppgávan hjá lívfrøðinginum verður at granska í havsúgdjórum í føroyskum øki. Eisini skal viðkomandi vera við í ráðgeving og fundararbeiði í samband við havsúgdjór, bæði her heima og í altjóða høpi.

Viðkomandi skal eisini kunna taka lut í øðrum arbeiði á djóradeildini á Náttúrugripasavninum.

**Førleikakrøv**
Kravt verður, at umsøkjarin hevur:
- lívfrøðiliga útbúgving á cand. scient. stigi
- góðan kunnleika til føroyskt og enskt mál
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni og evni at fyriskipa

Fyrimunur er, um viðkomandi hevur starvsroyndir innan økið.

**Treytir**
Setanartreytir og løn verða sambart sáttmála millum Fiskimálastýrið, og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Fiskimálastýrið, og arbeiðsplássi verður Føroya Náttúrugripasavn. Setanin fevnir um Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini.

**Umsókn**
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, mugu vera Føroya Náttúrugripasavni í hendi í seinasta lagi 1. februar 2001.

Umsóknir skulu sendast til:
**Føroya Náttúrugripasavn, Debesartrøð, V.U. Hammersheimsgøta 13, 100 Tórshavn**

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Náttúrugripasavnið á tlf. 318588 og tosa við Dorete Bloch, stjóra.

**FØROYA NÁTTÚRUGRIPASAVN, Djóradeildin**
Fútalág 40
100 Tórshavn
Tlf. 318588
Fax 318589
E-mail: doreteb@ngs.fo

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki til eina familju í Norðoyggjum.

Málið við stuðlunum er, í neyvum samstarvi við avvarðandi barnaverndarnevnd og Almannastovuna, at veita familjuni ráð – og vegleiðing í uppalingarligum- og gerandisligum viðurskiftum og at menna og stuðla 3 børnum likamliga, sálarliga og sosialt.

Arbeiðstíðin verður skipað í samráð við familjuna og verður ávikavist 15 og 25 tímar um vikuna.

Stuðulsjáttanin er fyribils fram til 30.06.2001.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi 04.02.2001 og skulu stílast til:

**Almannastovan**
Norðoya deild
att. Súsanna Gaard, sosialráðgevi
700 Klaksvík

Nærri upplýsingar um arbeiðið fáast á tlf. nr. 314822 hjá Ragnhild Dahl og tlf. nr. 315480 lokal 141 hjá Sigrun Bærentsen.

# Ph.d.-ritgerð

## góðkend til verju á Fróðskaparsetri Føroya

Fríggjadagin 9. februar 2001 fer Andras Mortensen, cand. mag., at verja ph.d.-ritgerðina *Hin føroyski róðrarbáturin. Sjómentir føroyingar í eldri tíð* við Fróðskaparsetur Føroya.

Í dómsnevndini hava sitið Jóhan Hendrik Winther Poulsen, professari, Kirkjubø, Arne Emil Christensen, professari við Universitetið í Oslo og Bjarne Stoklund, professari við Universitetið í Keypmannahavn.

Sjálv verjan, sum er almenn, fer fram í høllini á Føroya sjómansskúla. Byrjað verður kl. 13.00.

Bókin *Hin føroyski róðrarbáturin. Sjómentir føroyinga í eldri tíð* liggur alment frammi á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum og á Føroya Landsbókasavni frá. Hon fæst eisini til keyps í bókabúðunum. Útgevari er Føroya Fróðskaparfelag, Tórshavn 2000, 360 s. (ISBN 99918-41-26-1, ISSN 0365-67772).

**Fróðskaparsetur Føroya**
Setursskrivstovan
J. C. Svabosgøta 14
100 Tórshavn

**DANNY TRANSPORT**

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192

Visti tú ikki tað? Sosialurin



zarepta

# ZAREPTA-legurnar 2001

**Um GUD vil, er ætlanin at hava hesar legur í Zarepta í Vatnsoyrum í summar:**

| | Frá | Til |
|---|---|---|
| Lega fyri brekað | hósd. 10.05. | sunnud. 13.05. |
| Familjulega I | leygard. 26.05. | fríggjad. 01.06. |
| Familjulega II | leygard. 02.06. | fríggjad. 08.06. |
| Familjulega III | leygard. 09.06. | fríggjad. 15.06. |
| Familjulega IV | leygard. 16.06. | fríggjad. 22.06. |
| Lega fyri einlig | fríggjad. 22.06. | sunnud. 24.06. |
| Summarlega I (16-17 ár) | leygard. 30.06. | fríggjad. 06.07. |
| Summarlega II (14-15 ár) | leygard. 07.07. | fríggjad. 13.07. |
| Summarlega III (13 ár) | leygard.14.07. | fríggjad. 20.07. |
| Summarlega IV (12 ár) | leygard. 21.07. | fríggjad. 27.07. |
| Summarlega V (11 ár) | leygard. 28.07. | fríggjad. 03.08. |
| Summarlega VI (10 ár) | leygard. 04.08. | hósd. 09.08. |
| Summarlega VII (9 ár) | leygard. 11.08. | hósd. 16.08. |
| Lega fyri 18 ár og eldri | hósd. 16.08. | sunnud. 19.08. |
| Familjulega V | sunnud. 19.08. | leygard. 25.08. |
| Bíbliuskeið | sunnud. 26.08. | sunnud. 02.09. |
| Hjúnastevna I | fríggjad. 07.09. | sunnud. 09.09. |
| Hjúnastevna II | fríggjad. 14.09. | sunnud. 16.09. |
| Kvinnustevna | fríggjad. 07.09. | sunnud. 09.09. |
| Mannsstevna | fríggjad. 28.09. | sunnud. 30.09. |
| Heystlega (14-17 ár) | fríggjad. 12.10. | mik. 17.10. |

**Nær tekningin fer fram verður lýst seinni.**

KPMG

# Maskinmaður

Fyri Spf Tavuna í Leirvík, verður søkt eftir einum maskinmanni at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Starvið umfatar dagliga røkt av øllum maskinum og amboðum sum hoyra til eitt flakavirkið, herundir flakamaskinur, frystari og frystiútgerð.

**Umsøkjarin**
Umsøkjarin skal kunna arbeiða sjálvstøðugt. Talan er eisini um skiftandi arbeiðstíðir orsakað av vaktarskipan.

Fyri rætta umsøkjaran er talan um eitt avbjóðandi og spennandi framtíðarstarv.

**Lønin**
Lønin verður ásett eftir nærri avtalu við leiðsluna.

Umsóknin verður at senda til Spf Tavuna í Leirvík, skjótast gjørligt og í seinasta lagi 1. februar 2001.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til stjóran Ingvar Joensen.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn
Tel 34 34 34 Fax 34 34 35

PF. Restorffs ASSU

i Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Føroya Tele - Klaksvík

**Lærlingur til Telebúðina**

Søkt verður eftir lærlingi til Telebúðini í Klaksvík skjótast gjørligt.

Telebúðin í Klaksvík er ein av sjey Telebúðum kring landið. Telebúðirnar hava ment seg munandi seinastu árini og ætlanirnar fyri framtíðina eru stórar. Til handilin í Klaksvík søkja vit eftir einum lærlingi, sum skal luttaka í øllum uppgávum, ið skulu til fyri at viðskiftafólkið fær eina góða tænastu.

Til rætta fólkið hava vit eitt sera spennandi starv.

**Til starvið ynskja vit eitt fólk við:**
- førleika at seta seg inn í nýggja tøkni
- evnum at samstarva við nógvar ymiskar starvsfólkabólkar
- ídni at røkka ásett mál

**Lærutíðin er:**
- 4 ár uttan útbúgving,
- 3 ár við FHS,
- 2 ár og 18 mðr. við Studentaprógvi,
- 2 ár við HH,
- 4 ferðir til Danmarkar á skeið.

Lønin er sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Telebúðin í Klaksvík er opin allar vanligar handilstíðir og arbeitt verður í skiftum við hini starvsfólkini í handlinum.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Pól Sundskarð á tlf. 45 74 88.

Umsóknir skulu vera Føroya Tele í hendi seinasta lagi mánadagin 5. februar 2001 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697

SANSIR · TEL 355 355